tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Tvíeggjað svørð

## *Oddagrein*

Føroyingar sleppa kanska at flúgva bíliga til Suðurevropa í summar. Kappingarráðið mælir Vinnumálastýrinum til at góðkenna, at Mærsk Air fær loyvi at geva føroyingum eitt tilboð at sleppa at flúgva bíliga til Suðurevropa í juli og hálvan august mánað.

Fer Vinnumálastýrð at góðkenna átakið hjá danska flogfelagnum, fáa føroyingar av álvara møguleika at flúgva bíliga. Hendan møguleika hava felst øll havt hesi seinastu árini, tá kappingin gjørdist frí og ymiskar ásetingar eru gjørdar meiri liberalar.

Tað eru bara føroyingar og grønlendingar um okkara leiðir, sum ikki hava havt henda møguleika, emðan íslendingar hava kunnað gjørt sær dælt av at flogið bíliga so tað forslær. Um føroyingar hava flogið umvegis Ísland við Atlantsflog hava føroyingar kunnað flogið til USA og aftur fyri nakrar fáar túsund krónur.

Nú fer hesin møguleiki at standa føroyingum í boði at flúgva beinleiðis úr Føroyum og til nakrar stórbýir í Evropa, um føroyska og danska ferðslumálaráðið góðtaka átakið hjá Mærsk Air. Og hví skal vinligi føroyingurin ikki fáa hendan møguleikan?

Men, tað er sjálvandi altíð eitt men uppií. Og tað er, at ein økt kapping við bíligari ferðaseðlum kann fáa avleiðingar fyri føroyska flogfelagið, Atlantsflog. Men Atlantsflog má kunna tola kapping. Alt gongur móti fríari kapping á hesum øki, og vit kunnu ikki hava eitt flogfelag, sum liggur vart, og sum ger, at føroyingar ikki kunnu fáa part í alsamt bíligari flúgving, vil onkur siga.

Afturímóti hesum kann sigast, at hevði landsstýrið við Atla Dam sum løgmanni og Lassa Klein sum landsstýrismanni í samferðslumálum ikki stovnað føroyska flogfelagið, hvødu føroyingar ikki havt teir bíligu flogferðaseðlar, sum teir hóast alt hava nú.

Danska flogfelagið hevði ikki nakra kapping og príslegan var tí høg. Hóast flogfelagið hevði stórt avlop, søkti tað alla tíðina um at sleppa at hækka prísirnar. Hesum hevur kappingin frá Atlantsflog forðað fyri.

Tí má eisini ansast eftir, at vit ikki koma í ta støðu, at føroyska flogfarið tapir í kappingini, og at vit sum frálíður aftur bara hava eitt danskt flogfelag at dúva uppá. Tá fara vit neyvan at hava so bíligar ferðaseðlaprísir og fáa so góð tilboð, sum standa føroyingum í boði í summar. Talan er tí um eitt tvíeggjað svørð, sum landsstýrið má handfara varisliga.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# www.hesufer.fo misnýtir viðmerkingar

Tað skal sláast fast beinanvegin, at heimasíðan, www.hesufer.fo, ikki eigur at takast í fullum álvara, tí álvarsligar villur og propaganda ræður í kjakskipanini.

Nógv umtalaða heimasíðan, ið stuðlar uppundir fullveldi, veitir brúkarum villleiðandi og skeivar upplýsingar.

www.hesufer.fo misnýtir nøvn og viðmerkingar hjá fólki, ið gera sær ómak við at skriva innlegg í kjakpartin á heimasíðuni.

**Innleggið varð broytt**
Hetta kann tykjast sum ein lítil teknisk søga, og er hon lættari at skilja hjá fólki, ið kenna til kjak-skipanina hjá www.hesufer.fo.

Tann 19. mai valdi eg at skriva eitt nýtt innlegg við heitinum ”Propaganda“. Skipanin setur sjálv avsendaran á inleggið, og tá tað varð sent til kjakskipanina hjá www.hesufer.fo, kom tað sum ein rættur kvøkkur, at evnið, eg hevði sent, var broytt til viðmerking í einum heilt øðrum kjaki.

Heimasíðan www.hesufer.fo hevur eitt yvirlit yvir viðmerkingar á vinstru síðu, og har sæst, hvør byrjar kjak og hvør svarar aftur.

Til ber at trýsta á tey ymisku innleggini á vinstru síðu, samstundis sum møguleiki er at lesa viðmerkingarnar høgrumegin.

Men her er alt eitt stórt kaos, tí tá eg trýsti á mítt egna innlegg vinstrumegin, kom ein fyrilestur frá dulnevndum, ið kallar seg fyri ”Grønlandsfararin”, fram á skíggjan.

Hesin skrivar so um tað góða við fullveldinum og tað negativa við Danmark og Grønlandi. Hetta samsvarar sostatt ikki við mítt innlegg til kjak, og vanligi lesarin fær tíverri ta fatan, at undirritaði, sum er formaður í Unga Sambandinum, hevur skift politiska kós.

**Misnýtslan**
Hetta er ein háðan ímóti einari meining, samstundis sum tað er at misbrúka nøvn og viðmerkingar til egnan fyrimun. Tann háttur, viðmerking mín verður propaganda-misnýtt uppá, fær tískil mítt bikar at flóta yvir.

**Systematiskt propaganda**
Eg vil heita á Vár í Ólavstovu, NORA ella Kjartan Hoydal og restina av propaganda-fólki/apparatum teirra um at broyta teirra hættir at bera fram sín boðskap uppá. Hetta luktar alt ov langan veg av systematiskum propaganda, samstundis sum hetta týðiliga gevur føroyinginum ein forsmakk uppá fullveldið.

Tað skal líka nevnast, at júst tað sama er hent í øðrum viðmerkingum, ið eg havi sent til www.hesufer.fo.

**Michael Jensen**
**Formaður í Ungmannafelagnum Samband**

# 20 ár í Eliaskirkjuni

Í ár eru 20 ár liðin, síðani *Føroyska arbeiðið í Eliaskirkjuni* í Keypmannahavn so spakuliga byrjaði. Tað var í september 1980, at nøkur ung lesandi fóru undir at hava bíbliutímar saman. Arbeiðið menti seg við tíðini og í dag umfatar arbeiðið nógvar ymiskar greinar. Vit hava møti hvørt leygarkvøld, sunnudagsskúla í tveimum støðum hvønn sunnudag og fýra bíbliubólkar. Harumafturat koma egin blaðútgáva, føroysk møtir aðrastaðni á Sjællandi og andaktir á Hotel Thorshavn.

*Føroyska arbeiðið í Eliaskirkjuni* er eitt sjálvstøðugt missiónsarbeiði í fólkakirkjuni. Endamálið er at boða gleðiboðskapin um Jesus Kristus, at styrkja hin kristna felagsskapin og at kalla menniskju til tænastu í kristnu meinigheitini og til ábyrgdarkenslu í samfelagnum.

20-áradagurin verður hátíðarhildin í Eliaskirkjuni leygarkvøldið 9. september 2000 kl. 19. Øll, sum eru góð við arbeiðið, eru hjartaliga vælkomin. Best er, um boðað verður frá luttøku í seinasta lagi 26. august á tlf. 36 77 38 20 ella 32 96 99 95 ella við telduposti til eliaskir@danbbs.dk.

# Stór muturgøla í Írlandi

*Fyrrverandi írski forsætirsráðharrin, Charles Hauehey,er ákærdur fyri at hava tikið ímóti 8,5 milliónur írskum pundum í mutri. Tað svarar til góðar 80 milliónir danskar krónur*

EDVARD JOENSEN
DUBLIN

Fyrrverandi írski forsætisráðharrin, Charles Hauehey, er ákærdur fyri í seks førum at hava tikið ímóti mutri í tíðarskeiðnum frá 1979 til 1996. Upphæddirnar, sum rætturin í Dublin nú kannar liggja millum 50.000 pund og 1,7 mió pund. Talan er um mutur frá ymsum persónum og fyritøkum, byggifeløgum, supermarknaðum og ríkum arabiskukm prinsum. Charles Hauehey kann rokna við eini hampuliga stórari revsing, verður hann dømdur. Bara skattarokningin verður mett at fara at liggja upp ímóti 10 milliónum pundum ella út ímóti 100 mió donskum krónum.

Írland hevur upplivað eina øgiliga búskaparliga framgongd síðstu árini, og hesa tíðina hava stóru altjóða fyritøkurnar kappast um at mutra leiðandi politikarar fyri at sleppa at gera íløgur í írlandi.

ES letur stuðul, so sum skattalætta, til fremmandar fyritøkur, sum gera íløgur í landinum. Og tað er m. a. hendan skatta fyritøkurnar mutra politikararnar fyri at fáa.

# Floytutrio á konsertferð

Floytutrioin mannað við Magnu, Gunnvør og Andreu fer at halda tvær konsertir um vikuskiftið. Tann fyrra verður í Gøtu kirkju leygardagin kl. 15.00 og hin seinna í tí gomlu katólsku kirkjuni í Nunnuskúlanum sunnudagin kl. 17.

Skráin er sett saman við verkum frá barokktíðini eftir Boismortier og Quantz, klassiskt við Mozart og modernað við Casterède. Harafturat frumframførir Andrea eitt solostykki eftir Kára Bæk, sum ber heitið »Snjólýsi« eftir yrking hjá Chr. Matras.



*Andrea Heindriksdóttir og Kári Bæk*

Magna Jógvansdóttir, Gunnvør Eyvindsdóttir Mohr og Andrea Heindriksdóttir spældu saman og hildu fleiri konsertir fyri fleiri árum síðani. Nú hava tær tikið upp aftur samstarvið og spennandi og forkunnugt verður at hoyra henda Føroya einasta floytukvinnubólk á konsertferð.



# Drál kostar tvørafólki 2,5 milliónir

*Saneringin hjá ringast staddu kommununum er ikki ílagi enn. Hetta drál ger, at Tvøroyrar Kommuna skal betala nógv meiri í rentum og avdráttum, enn mett*



*Enn er Tvøroyri ikki sloppin burturúr kreppuni og í gjár máti býráðið undir tað tungu gongd at seta sparingar í verk fyri at kunna betala rentur og avdráttir í summar. Men tað var ongin vegur uttanum og ætlanin var einmælt samtykt*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tvørafólk eru ikki sloppin burturúr kreppuni enn.

Og á býráðsfundi mikukvøldið, mátti býráðið taka ta tungu avgerð at seta sparingar í verk fyri at fáa ráð til at betala rentur og avdráttir í summar.

Men tað var eitt samt býráð sum ásannaði, at tað var ongin vegur uttanum, so ætlanin at seta sparingarnar í verk, varð samtykt við øllum sjey atkvøðunum í býráðnum.

Sparingarnar vórðu settar í verk við at endurskoða fíggjarlógina, sum varð løgd í heyst fyri árið í ár.

**Mugu spara 2,5 mió.**
Talan er um ikki minni enn 2,5 milliónir, sum skulu sparast á fíggjarlógini í ár.

Og tað er ein rættiliga umfatandi sparing í einum kommunukassa.

Orsøkin til sparingina er, at saneringin, sum løgtingið samtykti fyrr í ár at lata tær ringast staddu kommunurnar fáa, er ikki fingin í lag enn.

Løgtingið hevur langt síðani samtykt at sanera tær ringast staddu kommunurnar, so at ongin kommuna hereftir skal skylda meiri enn tríggjar álíkningar.

Men síðani hevur málið ferðast aftur og fram í almennu umsitingini og tí er saneringin ikki sett í verk enn.

Og eftir tí, sum kom fram á býráðsfundinum mikukvøldið, er tað hetta drálið, sum nú kostar Tvøroyrar Kommunu 2,5 milliónir.

Saneringin gongur ígjøgnum kreppulánsgrunnin og hann skuldi gerast upp 30. juni í fjør.

Men eftir tí, sum varð upplýst á býráðsfundinum mikukvøldið, hevði tað ikki borið til at gera hann upp, tí tað vóru tvær kommunur, sum ikki høvdu sent grunninum uppgerðina yvir lánini.

Av tí sama hevur heldur ikki borið til at seta saneringina í verk enn.

Upprunaliga skuldi Tvøroyrar Kommuna betala 15,8 milliónir í rentum og avdráttum í ár.

Men eftir saneringina, kom rentu- og avdráttarbyrðan niður á góðar 11 milliónir.

Og tað er eftir einum gjaldið uppá góðar 11 milliónir at Býráðið legði fíggjarætlanina fyri í ár.

Men nú saneringin ikki er komin í gildið, noyðist kommunan ístaðin enn at betala 15,8 milliónir í avdráttum.

Og fyrra hálvár í ár verður eykarokningin til rentur og avdrátt tískil einar 2,5 milliónir. So leingi saneringin ikki er komin í gildi, er hetta onki at gera við hjá býráðnum, uttan at betala.

Dan Nielsen, býráðsformaður sigur, at sparingarnar, sum vóru neyðugar, eru framdar á flest øllum málsøkjum.

Men harðast er tað gingið útyvir tekniska økið, har serliga ætlaða vatnútbyggingin verður útsett. Annars er ymiskt viðlíkahald spart burtur á nógvum økjum, fyri at koma á mál.

Býráðsformaðurin harmast um, at saneringin ikki er komin í gildið enn, men at býráðið roynir at streingja á fyri at fáa málið avgreitt.

Hann sigur, at næsta takið er at leggja alla kommunuskuldina um til so bílig lán sum gjørligt, og tað arbeiðið er býráðið longu farið undir.

Avtalan um kommunuskuldina gongur út á nýggjárinum og tá skal nýggj avtala verða klár. Og tað ræður um at vera í góðari tíð, sigur hann.

Tvøroyrar Kommuna skyldar góðar 130 mió. Eftir saneringina kemur skuldin niður á góðar 100 mió.

# Taka við læru av royndum

Norsku vinnufeløgini ávara norsku umsitingina um at ansa sær, tá tulkingar verða gjørdar av ES-direktivum, skrivar Vinnuhúsið.

Hvussu ES-direktivini verða tulkað er í stóran mun tengt at teimum persónum, sum smíða og umsita nationala lógarverki. Í ávísum førum hevur norska umsitingin tulkað ES direktivini munandi strangari enn onnur evropeisk lond gera, við tí úrsliti at vørur, sum ikki verða góðkendar í Noregi, verða góðkendar í ES-londum. Hetta hevur rakt einstøk virkir, sum mæla umsitingini til at ansa eftir, at tulkingarnar av ES-direktivunum ikki gerast so strangar, at tær gerast kappingaravlagandi fyri norska vinnu.

Tá føroysk lóggáva skal gerast, t.d. í samband við heilsufrøðiligu avtaluna við ES, er tað týdningarmiki at taka við læru av slíkum royndum hjá øðrum.

# Djóradagur í Havnardali

Komandi vikuskifti, leygardagin 27. og sunnudagin 28. mai, skipar Føroya Ríðingarfelag fyri stórum familjutiltaki á øki felagsins útí í Havnardali.

Á skránni verður djóragarður, ponyríðing, fiskibrunnur, stuttleikakapping (ríðing), framsýning av greðingum, seyðhundaframsýning, framsýning av ymiskari útgerð, highstriker, hoppiborg og søla av mati og drekka.

Byrjað verður leygardagin kl. 14.00 við djóragarði við lombum, kálvum, gæs o.ø. dýrum. Eisini er framsýning av ymiskari útgerð, so sum reiðútgerð, fóðri, hegni, o.ø. Somuleiðis verður fiskibrunnur og søla av mati og drekka. Kl. 14.30 verður stuttleikakapping (ríðing) og klokkan 15-17 verður ponyríðing. Leygardagin endar tiltakið kl. 18.

Sunnudagin verður byrjað kl. 14 við djóragarði, framsýning av ymiskari útgerð, fiskibrunni og sølu av mati og drekka. Kl. 15 verður framsýning av føroyskum og íslendskum greðingum saman av avkomi. Kl. 16-18 verður ponyríðing. Tiltakið endar sunnudagin kl. 19.

Inntøkurnar frá tiltakinum fara til gerð av venjingarvølli og at fríðka um økið í Havnardali. Atgongugjaldið verður kr. 50 fyri vaksin. Børn undir 16 ár sleppa inn ókeypis.

Hetta er aðru ferð at skipað verður fyri slíkum tiltaki. Tiltakið var væl vitjað seinast, og felagið vónar, at fólk, børn og vaksin, fáa eitt upplivingarríkt vikuskifti á djóradøgunum í Havnardali.

